# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
## Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1508.
## Tíðarskeið: 18/03-26/03 - 2015

**Fólk við frá Havstovuni:** Regin Kristiansen, Mourits Mohr Joensen, Jens Arni Thomassen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa og longu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, rogni og øðrum, varð selt til matstovuvinnuna í Havn.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. Seabird 25 CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini fríggjakvøldið 20/3 kl. 18:20. Tóku fríggjadagin tríggjar støðir, sum lógu eftir frá túri 1506, og vit fingu tí ikki tikið hinar fýra støðirnar, sum restaðu í fyri túr 1406. Byrjaðu at taka støðir á Føroyabanka sunnumorgunin og tóku støðir til og við týsdagin. Sostatt vórðu 19 av 29 støðum tiknar, 18 har tað var grynri enn 200 metrar og ein støð djúpari. Vit mistu ein miniloggara. Av tíðarneyð vórðu ongar CTD-støðir tiknar uttan ein støð í bankarennuni, har tveir miniloggarar vórðu kalibreraðir.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Vit fingu ov lítið og høvdu ov lítla tíð at taka tað ætlaða talið av nytrum (umleið 400).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 25. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Meðan yvirlitstrolingarnar í september hava víst, at sera lítið hevur verið av toski á Føroyabanka síðan 2006, var tó nakað at fáa av toski í mars 2013 og 2014. Í verandi yvirlitstroling í mars 2015 var tað tó lítið at fáa av toski, bert 49 toskar og var eingin teirra minni enn 89 cm. Hetta bendir á, at tað helst hevur verið lítið til av toski á Føroyabanka øll árini eftir 2006, men at ein av tilvild kann fáa nógv í gýtingartíðini onkur ár, tá toskurin stendur tættur. Eisini var lítið at fáa av hýsu, men tó nakað av smáari. Hinvegin var meira at fáa av longu og glýsufiski. Av tí at bert ein djúp støð varð tikin er ilt at siga nakað um støðuna hjá fiskasløgum á djúpum vatni, til dømis upsa. Magakanningarnar vístu, at nebbasild framvegis er týdningarmikil føði. Hitin við botn lá um 8 gradir Celcius.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1508 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| FISKASLAG | KG í 19 hálum | Nytrur | Magar | KG í 27 hálum í fjør | Lutfall KG per støð |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 843.375 | 263 | 87 | 1037.52 | 1.16 |
| LONGA | 788.551 | 35 | 6 | 247.680 | 4.52 |
| TOSKUR | 669.330 | 49 | 28 | 4184.069 | 0.23 |
| GLÝSUFISKUR | 354.789 | | | 191.351 | 2.63 |
| UPSI | 85.655 | 25 | 7 | 440.070 | 0.28 |
| KNURRHANI | 46.246 | | | 9.136 | 7.19 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 40.658 | | | 49.618 | 1.16 |
| HAVMÚS | 30.528 | | | 2616.569 | 0.02 |
| LOLIGO | 30.240 | | | 211.693 | 0.20 |
| SKRAMBUL | 26.279 | | | 28.682 | 1.30 |
| HAVTASKA | 19.040 | | | 11.425 | 2.37 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 10.455 | | | 35.968 | 0.41 |
| NAGLASKØTA | 6.380 | | | 0 | |
| SANDSPRØKA | 3.827 | | | 4.400 | 1.24 |
| GLASKVOYSA | 3.265 | | | 0 | |
| NEBBASILD | 2.648 | | | 13.606 | 0.28 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 2.509 | | | 0 | |
| TUNGA | 2.330 | | | 7.202 | 0.46 |
| BROSMA | 2.050 | 1 | | 6.070 | 0.48 |
| ELEDONE | 1.461 | | | 0 | |
| TILSAMANS | 2969.616 | 373 | 128 | 9095.059 | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur1508d.doc”.

Petur Steingrund